## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Thomasia og Alfred Haraldsen krúndiamantbrúdleyp

Sunnudagin 19. desember 2004 hava hjúnini Thomasia og Alfred Haraldsen, Elduvík, krúndiamantbrúdleyp.

Alfred er føddur í Elduvík í 1916, foreldrini vóru Sofus Haraldsen úr Elduvík og Andrea Dahl úr Oyndarfirði. Thomasia er fødd í Funningsfirði í 1918, foreldrini vóru Marius Joensen úr Funningsfirði, og Anna Maria Gøte úr Norðragøtu.

Thomasia og Alfed eiga trý børn: Sigrid, Amaliar og Henry, sum øll búgva í Havn.

Alfred var til sjós, frá tí at hann var 16 ára gamal til mitt í fimmtiárunum, tá hann legðist uppi og fór til



Havnar at arbeiða hjá byggifelagnum Danberg & Joensen.

Seinni, tá ið Fjarðavegurin byrjaði, fekk hann arbeiði har, síðan á Elduvíkarvegnum og á Funningsvegnum.

Nevnast skal eisini, at hann frá 1960 røkti starvið sum linjumaður fyri Telefonverkið, til hesar vórðu tiknar niður.

Aftaná stórkavan í 1947 tók hann við sum seyðamaður "Undir Egg", sum hann røktaði til mitt í sekstiárunum, og tók við aftur í Ognarpartinum á Múlanum, sum hann røkti til fyri fáum árum síðan. Sum 88 ára gamal passar hann seyðin enn.

Thomasia fór sum ung út at tæna eitt nú á Syðradali, hjá Mariusi, seinni fór hon at arbeiða fisk í Klaksvík. Eftir at vera gift og búsett í Elduvík, tók hon sær av húsarhaldinum og tí sum har til hoyrdi, eitt nú kúgv, seyði, torvi, hoygging og tøting, sum gav eitt fitt íkast til húsarhaldið.

Dagurin verður hildin fyri innbodnum hjá dóttrini í Brøttulíð 20, Tórshavn.

# Fimm ættarlið á Skálafjørðinum



Tað er ikki á hvørjum sinni, at tað eru fimm ættarlið í eini familju, men tað kemur meira enn so fyri.

Á hesi myndini síggja vit fimm ættarlið, har tað yngsta er tveir mánaðir – og tað elsta er 91 ár.

Lítli Aron liggur tryggur í fanginum á oldurommuni, Sannu, sum bæði er klár og byrg. Hon er ættað úr Rytuvík, men hevur búð hjá børnum sínum, síðan maður hennara, Hans, ættaður úr Lamba, doyði fyri seks árum síðan, 88 ára gamal.

Undir liðini á Sannu situr dóttirin, Margit Olsen, sum er 60 ára gomul. Hon er gift við Páll Olsen; tey búgva í Saltnesi.

Aftanfyri Margit stendur dóttirin, Joanita Jacobsen (38), sum býr í Saltangará og er gift Jan Jacobsen, sum er av Strondum. Undir liðini á henni stendur sonurin, Páll (19), sum saman við Heidi N. Jacobsen, eigur lítla Aron.

Aron, Páll og Heidi búgva á Glyvrum.

-v.

## Tøkk

Eina hjartans tøkk til tykkum øll ið hava verið,
og eru um okkum í djúpu sorg okkara,
nú vit hava mist høgt elskaða mann, pápa,
son, bróðir, svág og verson

**Birgir Nónsgjógv**
Innan Glyvur

Takk fyri alla hjálp í samband við jarðarferðina
og ervið.
Takk fyri blómur og peningagávur.
Takk fyri vakran sang og vøkur orð í kirkjuni.
Takk til Jógvan prest fyri allan stuðul.
Takk øll tit, ið bera sorgina við okkum.
Høgt elskaður og dýrabarur var hann okkum.

*Vegna tey avvarðandi*

**Elisabeth, Bárður, Jógvan Páll, Teitur,
Jákup Andrias, Drós, Ester og Døgg**

*Gleðilig jól øll somul*

†

Okkara elskaða kona, mamma, omma, dóttir,
systir og vermamma

**Kára Djurhuus**

andaðist á Landssjúkrahúsinum
týsdagin 14. desember, 55 ára gomul.

Farið verður úr kapellinum á landssjúkrahúsinum
fríggjadagin 17. desember kl. 17.00.

Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni
leygardagin 18. desember kl. 13.00.

*Familjunar vegna*

**Sigmund, Bjørg, Jákup, Sheila og Uni**

Tey ið ynskja at minnast Káru kunnu lata eina peningagávu
til Fríðrikskirkjuna – konto í peningastovnunum.